


Effersøe systrarnar:

# Fyrsti mótahandil í landinum

**Effersøe navnið er kent í Føroyum. Vit hava greitt frá teirra uppruna í samband við frásøgn um grøvina hjá Poul Effersøe. Fleiri mans av hesi ætt hava verið kendir í Føroyum, og eru hesir eisini jarðaðir á Svínaryggi. Teir koma vit at umrøða seinni. Men tað eru eisini kvinnur í ættini. Tríggjar systrar hava sama gravstein, og tær fara vit at umrøða nú**



ÓLI JACOBSEN
olij@sosialurin.fo

Effersøe systrarnar vóru abbasystrar Edvard Mitens, sum skrivar um tær í bók síni Eg Minnist, bind 2. Tær vóru døtur tann fyrsta Effersøe, sum kom til Føroyar, Jón Effersøe. Ein sonur hansara var Gudmund Effersøe, sum gjørdist sýslumaður í Suðuroy. Hann var beiggi hesar systrarnar. Dóttir Gudmund, Josefina, giftist við Niels J. Mortensen, sum var stórreiðari. Havi hoyrt sum ungur, at Josefina fyri avlopið av húsarhaldspengunum keypti sítt egna skip!

Tá ið Edvard kom til Havnar sum 11 ára gamal í 1901 at ganga í realskúla búði hann hjá abbasystrunum í Mettustovu. Edvard greiðir frá, at hann ongantíð hevði verið uttanfyri Froðbiar sókn, men beiggin Gudmund, abbi tann Gudmund, sum nú er stjóri hjá N.J. Mortensen, vísti honum runt.

Abbasystrarnar kallaðust Josephina, Vilhelmina og Henrietta. Tær vóru systrar Oliver, Poul og Rasmus. Edvard letur væl at, at tær vóru blíðar, og tað var skjótt, at hann kendi tað hugnaligt og heimligt í Mettustovu. Um tær skrivar Edvard, at Josephina hevði verið lærarinna við handarbeiðisskúlan í Fútastovu, har gentur lærdu at binda, seyma og veva. Nú var hon gomul og songarliggjandi. Meðan Edvard og Gudmund vóru á Tvøroyri í jólafrítíð, doyði hon av elli 83 ára gomul, og hon varð grivin í kirkjugarðinum á Svínaryggi 2. januar 1902. Teir fylgdu henni til gravar ein kaldan vetrardag.

Henrietta hjálpti í húsinum. Hon gjørdi reint, turkaði dust burtur, flutti tey mongu bíløt, ið stóðu á borðum, turkaði tey og setti tey aftur beint har, tey høvdu staðið. Hon var nakað sjúklig, hevði astma og hostaði. Hon keypti sær lakress og hostabomm, ið hon javnan át fyri hosta. Hon var eitt sindur undarlig. Hon fór so at siga hvønn dag út at spáka og heilsaði blíðliga uppá fólk og prátaði. Tað er tiltikið, at hon plagdi at taka til: "Milt, men kølið" eins og bretar heilsa "nice morning", um tað so regnar. Gudmund argaði Jettu viðhvørt við at flyta bíløtini. Tað dámdi henni illa. Hon fór eftir Gudmundi, og tey runnu rundan um borðið, til Mina legði uppí. Jetta doyði í 1911 og varð grivin undir liðini á Josephinu.



*Vilhelmina var fyrsta mótadrotning í Havn. Tað finst nokk ikki mynd av hinum systrunum.*

Mina var røsk og arbeiðssom. Hon hevði manufakturhandil, pyntaði og seymaði hattar. Handilin var í sunnara parti av Mettustovu. Har var serlig inngongd, og tá ið onkur kom at keypa og læt hurðina upp, ringdi klokka, og Mina fór oman í handilin. Har kom til dømis genta at keypa hatt. Reyða rósu ynskti hon á hattin. Mina spyr, hvørjumegin rósan skal setast. Gentan svarar: "Mannfólkamegin". Tað var tí megin, ið vendi móti mannafólkabeinkjunum, tá ið gentan kom inn í kirkjuna!

Annað dømi er, at Mina fekk hatt sendan at pynta saman við brævi, ið ljóðaði nakað soleiðis:

"Jeg sender dig min gamle hat. Reparer ham og giv ham et blåt bånd at live ham op."

Mina tanta seldi so væl, at systrarnar kundu liva av handlinum og arbeiði hennara. Hon seldi eisini sjokolátu og mandlustengur. Maður hevur sagt Edvardi, at hann keypti pappírsflippur har.

Hon setti av og á lýsing í Dimmalætting so sum hesa:

***Til konfirmationen***
*Fransk og figurert kjoletøj, shirting, blonder, pibestrimler, lommetørklæder, korsetter, handsker, hatte, kasketter og huer, kraver, flipper, manchetter, slips.*

Edvard skrivar, at "Mina tanta var sera dámlig og gott menniskja. Hon var góð við meg og onnur børn, ið fyrr ella seinni gistu í Mettustovu, og vit minnast hana við stórum takksemi. Sama er við Onnu Sofíu, ið var arbeiðskona har frá ungum árum til Mina tanta doyði í 1923, 87 ára gomul. Hon hvílir í kirkjugarðinum saman við hinum systrunum."

*JOSEPHINE EFFERSØE*
*F. 10-5-1818 D. 30-12-1901*
*HENRIETTE EFFERSØE*
*F. 7-10-1839 D. 3-10-1911*
*VILHELMINE EFFERSØE*
*F. 16-2-1836 D. 3-10-1911*



Samb. Tórshavnar skúlasøgu var Vilhelmina eisini fyristøðukvinna á handarbeiðsskúlanum til hann gavst umleið 1880.

### William Heinesen skrivar um systrarnar:

Herude (á Reyni) lå også jomfruerne Effersøes grønsværtækkede og sorttjærede modehandel "Mettestue". Dette modemagasin, i lang tid byens eneste, var, sandheden i ære, ikke meget større end et klædeskab. Her købte forfængelige ungmøer deres hattepynt og agramaner. I en af disse skuffedarier lå også sødt duftende mandelstænger. De smagte af mandelstænger og appretur. Snurrige var de tre modehandlersker, men fornemme damer var de, en pryd for gadebilledet, når de kom anstigende i deres fine franske sjaler. Bag butikken havde damerne deres bælgmørke, men hyggelige stue samt en røgstue med stampet jordgulv, hvor høns og kyllinger gik frit omkring.

**Mamma William, Caroline, skrivar m.a.:**
Der var tre gamle jomfruer Effersøe, hvoraf den ene var mors veninde, de boede i Mettestue. Når man blev sendt derned, måtte man kysse dem alle tre, og når man gik derfra, måtte man igen kysse dem.

**Komandi partur**

Komandi umrøðan verður av grøvini hjá Kathrinu Nicholson, f. Viderø. Hon var vermamma Daniel J. Danielsen, trúboðara í Congo, sum er umrøddur í Miðvikuni. Ætlanin var, at Kathrina skuldi liggja undir liðuni á dótrini Linu, men soleiðis skuldi ikki gangast.



*Josefina Mortensen var bróðurdóttir tær báðar. Hon keypti skip fyri avlopið av húsarhaldspengunum.*
*Myndaeigari: Føroya Fornminnissavn (4653F026)*

*Mettustova. Her var fyrsti mótahandil í Havn.*

